# Sudoku ein logisk avbjóðing

SUDOKU

Sudoku er skírt at vera avloysarin til krossorðagátur í tíðindabløðum. Spælið er vorðið alsamt betur umtókt, og alt fleiri tíðindabløð kring allan heim prenta talgáturnar. Sudoku bøkur er millum mest seldu bøkurnar í bókhandlunum eisini her heima. Nú bjóðar Sosialurin eisini sínum lesarum Sudoku gátur. Í samstarvi við fyritøkuna Pappocom fara vit at prenta eina nýggja Sudoku gátu hvønn dag fram til nýggjárs. Gáturnar vera av ymiskum torleikastigi, frá sera løttum til sera torført. Undir prentaðu gátunum stendur altíð frámerki við, fyri at vísa hvussu torfør hon er.

Í dag prenta vit fimm dømi um Sudoko talgátur, 9 kassar við 9 rútum eru settir saman í ein stóran kassa, og hvør av hesum kassum er ein gáta. Gáturnar eru í torleikastigunum: sera løtt, løtt, miðal, torfør og sera torfør. Tann lættasta gátan tekur millum 10 minuttir og ein hálvan tíma at loysa, meðan tann truplasta kann taka fleiri dagar. Men felags fyri tær allar er, at tær bert hava eina loysn og kunnu loysast við logikki og uttan at gita.

Reglurnar í Sudoko eru rættiliga einfaldar. Hvør kassi skal hava tølini 1-9 í sær og einki av tølunum skal vera skrivað tvær ferðir. Tað sama er galdandi fyri hvørja reglu og hvørja kolonnu í samlaða kassanum.

Vit kunnu byrja at loysa ovastu gátuna, ið er tann sera lætta. Vit royna at seta 7 talið í ovasta vinstra kassa, latum okkum rópa hann kassa 1. Legg til merkis at 7 talið í kassa 3 er í fyrsta rað. Hetta er 7 talið fyri alt fyrsta rað, so 7 talið er sostatt ikki í fyrsta rað í kassa 1. Hyggja við í kassa 2, so er 7 talið í øðrum rað, hetta merkir at 7 talið í kassa 1 er í triðja rað, og í hesum rað er bert eitt tómt pláss, tað er í millum 9 talið og 2 talið.

Latum okkum royna at seta 9 talið í kassa 2. Um vit hyggja at kassa 8(tað er tann niðasti í miðjuni), so er 9 talið í fimtu kolonnu, hetta er 9 talið fyri alla kolonnuna, sostatt er 9 talið ikki í fimtu kollonnu í kassa 2. Í kassa 5 er 9 talið í fjórðu kolonnu, sostatt má 9 talið vera í sættu kolonnu í kassa 2. Í sættu kolonnu eru tveir møguleikar, men hyggja vit í kassa 1 síggja vit 9 talið í triðja raði, sostatt skal 9 standa í fyrsta rað í kassa 2.

Fylgir tú hesum logikki, so kanst tú loysa allar gáturnar. Sjálvandi gerst tað heldur tuplari í teimum torføraru gátunum, og tú noyðist at hugsa teg nakað væl betur um, áðrenn tú setur tølini.



*Reglurnar í Sudoko eru rættiliga einfaldar. Hvør kassi skal hava tølini 1-9 í sær og einki av tølunum skal vera skrivað tvær ferðir*
*Mynd: Jens Kristian Vang*




## Sudoku-Kapping

Frá nú av og til jóla verða Sudoku uppgávur at finna hvønn dag í Sosialinum. Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnirnar innan 27. desember og viðmerkið brævbjálvan »Sudoku«. Vinningurin er ein Samsung E730 + eitt Teletíðarhald frá Føroya Tele. Virði 3.295 kr.

Henda fartelefonin hevur so at siga alt sum skal til í eini fartelefon. Megapixel-kamera, video, MP3, Bluetooth, FM-radio, 96 Mb minni v. m. Eisini hevur E730 ein TFT-skerm við 262.000 litum.

Trekt verður millum jól og nýggjár.

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8 | 1 | | | | | 7 | | 3 |
| | | | 6 | | 7 | | | 8 |
| 9 | | 2 | 3 | 1 | | 6 | | |
| | 4 | | | 7 | | 5 | 6 | |
| | | 7 | 9 | | 1 | 2 | | |
| | 6 | 3 | | 4 | | | 9 | |
| | | 4 | | 9 | 2 | 1 | | 6 |
| 6 | | | 5 | | 4 | | | |
| 7 | | 8 | | | | | 5 | 9 |

SERA LØTT # 1

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | 7 | 9 | |
| 2 | | | | | 7 | | 6 | |
| | 1 | 9 | 8 | 5 | | | 2 | |
| | | 8 | 1 | | 4 | | | |
| | 2 | 3 | | | | 9 | 1 | |
| | | | 7 | | 3 | 8 | | |
| | 3 | | | 7 | 9 | 2 | 5 | |
| | 5 | | 4 | | | | | 6 |
| | 4 | 2 | | | | | | |

LØTT # 2

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 3 | 2 | | | 8 | | | 7 |
| | | | | | | 1 | | |
| 7 | | | | 4 | | | 9 | |
| 6 | | | | | 7 | | 3 | |
| 1 | | | | | | | | 5 |
| | 9 | | 4 | | | | | 6 |
| | 1 | | | 3 | | | | 9 |
| | | 7 | | | | | | |
| 2 | | | 5 | | | 7 | 4 | |

MIÐAL # 3

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | | 6 |
| 2 | | | 9 | | 6 | | 1 | |
| | | 7 | | 2 | 5 | | | |
| 8 | | | 6 | | | | | 3 |
| 7 | 3 | | | | | | 8 | 9 |
| 5 | | | | | 8 | | | 7 |
| | | | 3 | 4 | | 6 | | |
| | 5 | | 8 | | 2 | | | 1 |
| 1 | | | | | | | | |

TRUPUL # 4

Navn: ______________________________

Bústaður: ______________________________

Sendið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan »Sudoku«